

– Hin Almáttugi letur okkum timbrið, men vit mugu sjálvi smíða hurðarnar inn í morgindagin, sigur tann grimi Heggen prestur, meistaraliga spældur av Hans Tórgarð.



Birita Mohr spælir Tove. Ein eym og alkoholiserað móðir, sum sveimar ímillum vulgaritet og sensitivitet.

MYNDIR: FINNUR JUSTINUSSEN

fortreyt. Heggen prestur, ein annar figurur í dreymaverðini hjá Dávidi, sum greitt endurspeglar pápa Dávid, setur orð á menniskjunnar eksistentiella útgangsstøði við orðum, sum fær tankarnar at leita til Jean Paul Sartre, Albert Camus og kompaní:

*»Hin Almáttugi letur okkum timbrið, men vit mugu sjálvi smíða hurðarnar inn í morgindagin. Hin Almáttugi letur okkum orðini, men vit mugu sjálvi seta tey saman í føgur orðatyssi«.*

Pinocchio-dukkan hjá Dávidi spyr, um tað er vandamikið at doyggja. Men leikurin tykist eins nógv spyrja, um tað er vandamikið at blíva føddur. Og svarið er eitt rungandi ja. Tað er stein etandi vandamikið at blíva føddur! Tí við føðingini kemur lívið. Uppá gott og ónt.

Og tað eru persónarnir í søguni livandi dømi um. Tann alkoholiseraða og prostitueraða mamma Dávid (Birita Mohr). Pápin til sjúka smádrongin, spældur av Hans Tórgarð, sum bukaði fyrrverandi konuna. Sum rýmdi frá familjuni og kom saman við einum lækna og trúboðara umborð á trúboðaraskipinum Logos, sum forrestin hevur ligið við kei í Havn. Nýggja konan eitur Flora (Barbara Christophersen). Ein smápsykotisk og religiónsforstýrað kvinna við bert einum beini, sum hevur mist sítt barn og nú samlar uppá deyðar summarfuglar. Kaotiskar lagnur við innistongdari líðing, sum av og á brúsa fram í dramatiskum pallmyndum.

## Birita og Hans

Leikurin hevur eina fríska samanseting av royndum og óroyndum leikarum, og øll átta levera vøruna. Tað er freistandi at siga »eingin nevndur, eingin gloymdur«, men eg kann ikki lata vera við at nevna »the grand old folks« Hans Tórgarð og Biritu Mohr, sum enn einaferð brilliera.

Birita Mohr hevur eminent evni til at balansera ímillum tað vulgera og tað sensitiva, sum skapar eina nuanseraða mynd av eini eymari mammu, sum hjúklar um sítt sjúka barn. Sum leingist eftir rýmda manninum. Men sum eisini osar av rótloysi, beiskleika og kynsligum villskapi. Og Hans Tórgarð alias Kaspar og Heggen, sum á mangan hátt er eitt ósympatiskt reyvarhol, men sum eisini rúmar innibyrgda líðing, sum er hjartaskerandi. Man verður heilt einfalt sogin inn í teirra univers. Tað er sjónleikur, tá hann er best.

## Undrið

Í søguni um Pinocchio gjørdist lítla trædukkan loksins menniskja. Men er tað nakað at ynskja sær? Er tað vist, at yvirgongdin frá lívleysari trædukku til livandi menniskja neyðturviliga var eitt framstig ella ein uppgradering? Lítli Dávid fer í øllum førum øvugtan veg, tá hann flýggjar frá kaotiska lívinum og rísur upp sum Pinocchio. Og spurningurin hongur í luftini, um lívið er eitt forbannilsi ella eitt vælsignilsi? Ella eitt sindur av hvørjum?

Í einum av dreymunum hjá Dávidi spyr Heggen prestur, hvat menniskjað er fyri nakað. Pinocchio svarar, at menniskjað er ein einsamallur skapningur í einum hurðagapi.

»Sum leingist eftir undrinum«, grælar úr tí ófrættakenda prestinum.

Sum leingist eftir undrinum? Í søguni um Pinocchio er tað stóra undrið, at Pinocchio gerst livandi. Undrið er føðingin. Undrið er lívið. Men undrið kann eisini vera deyðin, sum menniskju stundum leingjast eftir, tá lívið gerst ov tungt. Eitt undur, sum setir endaligt punktum fyri allari líðing og kvøl. Deyðin sum forloysandi frelsa kemur eisini til sjóndar í seinastu pallmyndini, tá revurin, katturin og veggjasmiðurin eygleiða eina jarðarferð:

Katturin: »Eg hevði viljað havt tað sum menniskjuni. Sloppið at lagt meg at sovið og ongantíð vakna aftur«.

Revurin: »Ein ævintýrvera átti ikki at blivið meiri enn hundrað ár (...) Eg hati hetta ævintýrslívið«.

Veggjasmiðurin: »Vit gerast heldur ongantíð hetjur. Bara tey deyðiligu kunnu gerast hetjur«.

Eg skal ikki koma við nøkrum endaligum svari uppá, hvat undrið er fyri nakað. Og hvat hendir »aftan á undrið«. Men Jóanes Nielsen hevur skrivað ein leik, sum starir niður í avgrundina uttan at hyggja til viks. Sum starir ímóti himni uttan at blunka. Sum tekur kampin upp við sjálvan eksistensin í øllum sínum grimleika.

Og tøkk fái tú fyri upplivingina, Jóanes.



»Aftan á undrið« er ein frísk samanseting av royndum og óroyndum leikarum. Her eru yngstu leikararnir Mariann Hansen og Durita Dahl Andreasen – í eini sexutari útgávu.